# Góð ábyrgdaravalluttøka

**Til ábyrgdaravalið hjá Norðoya Sparikassa, sum júst hevur verið, var valluttøkan á góðari leið**

ÁBYRGDARAVAL
*Solby A. Eliasen*



*Valúrslitið verður altíð almannakunngjørt á ábyrgdarafundi Norðoya Sparikassans*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Klaksvík:**
Norðoya Sparikassi hevur umleið 1.850 ábyrgdarar. Harav er ein partur undir 18 ár, og tey hava so ikki valrætt. Men av teimum, sum hava valrætt, vóru tað beint oman fyri 50 %, sum valdu at gera nýtslu av teirra atkvøðurætti. Og tað er á eini góðari leið, verður sagt frá Sparikassanum.

Umleið ein triðingur av limunum í umboðsráðnum vórðu skift út eftir hetta valið. Umboðsráðið er býtt upp í fýra øki. Økið eystan Múla, Kunoy og Kallsoy, Leirvík og Føroyar annars og Klaksvíkar kommuna og útlond.

Seks verða vald fyri økið eystan Múla, tvey fyri Kunoy og Kallsoy, níggju fyri Leirvík og Føroyar annars og 22 fyri Klaksvíkar kommunu og útlond. Tey 22, sum vórðu vald fyri Klaksvíkar kommunu og útlond eru øll búsitandi í Klaksvík í dag. Fyri økið eystan Múla er ein úr Fugloy, ein úr Svínoy og restin av Viðoynni. Sjey av teimum níggju í økinum fyri Leirvík og Føroyar annars eru búsitandi í ávíkavist Tórshavn, Runavík, Signabø, á Toftum og í Svínáum.

Eitt ábyrgdarafæ kostar minst 1.000 krónur. Tó ber ikki til at hava meira enn 10.000 krónur í ábyrgdarafæi. Ein ábyrgdari fær eina atkvøðu fyri hvørjar 1.000 krónurnar.

Umboðsráðið, sum sostatt verður valt av viðskiftafólkum, kemur saman tvær ferðir um árið. Einaferð í samband við aðalfundin, tá tveir nevndarlimir skulu veljast. Og einaferð til hálvársroknskapin hjá peningastovninum. Hetta plagar ofta at vera í august mánaði. Til henda kunnandi fundin um støðuna, er eisini ofta ein fyrilestur á skránni, har fyrilestrarhaldarin tekur okkurt evni fram, sum er aktuelt.

Bygnaðurin í Norðoya Sparikassa er sostatt hesin: Viðskiftafólk velja umboðsráðið, sum telur 39 fólk. Hesi velja so nevndarlimirnar, sum setur stjóran, sum so aftur setur starvsfólkið.
Ábyrgdaraval er annaðhvørt ár.

Løgmaður:

# Ongan áhuga í at tykta okkara egna barn

**– Løgmaður fer nú at kanna hørðu atfinningarnar hjá Føroya Banki ímóti landsstýrinum. Men hann sigur, at hann veit, hvat býr undir**

ATFINNINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Løgmaður skilir ikki hørðu atfinningarnar frá Føroya Banka ímóti Landsstýrinum, men hann fer nú at seta seg inn í málið*

Løgmaður fer nú at kanna tær lemjandi atfinningarnar, sum Føroya Banki setti fram ímóti landsstýrinum á aðalfundinum mikudagin og sum vit greiða frá í aðrari grein í blaðnum.

Tað sigur Anfinn Kallsberg við Sosialin í stuttari viðmerking til málið.

Tá ið vit tosaðu við hann í gjáramorgunin, hevði hann ikki lisið frágreiðingina hjá bankanum og tí vildi hann ikki fara í smálutir enn, fyrrenn hann hevur sett seg inn í málið.

Men tað ætlar hann eisini at gera fyri at vita, hvat hald er í atfinningunum frá bankanum, ella ikki.

Men hann sigur, at veit longu, hvat býr undir atfinngingunum.

– Bankin er ónøgdur við, at Elektron hevur verið noytt at gjalda 40 mió. í mvg.

– Tað, sum bankin fýlist á, at at Landsstýrið ikki treytaleyst gevur seg undir tað, sum bankin vil.

– Men við mvg málinum mugu vit eisini staðfesta, at Føroya Banki hevur tapt í Landsrættinum, men sum hann síðani hevur skotið málið inn fyri hægstarætt.

Anfinn Kallsberg sigur, at eftir hansara tykki hevur Landsstýrið víst góðan vilja til at loysa tað ósemjuna, men at Føroya Banki eftir øllum at døma ikki er nøgdur við loysnina, sum landsstýrið hevur skotið upp.

Hvør loysnin er, kann hann ikki siga nakað um, tí hann vil ikki fara í smálutir, fyrrenn hann hevur sæð frágreiðingina.

### Skilir ikki atfinningarnar

Men Løgmaður skilir als ikki atfinngingarnar hjá Føroya Banka og skuldsetingina um, at politikarar brúka eitthvørt høvi til at fara illa við peningastovunum.

– Bankin er at kalla allur sum hann er ogn hjá fíggingargrunninum, sum aftur er ogn hjá landskassanum og sostatt skattaborgarunum.

– Sostatt er tað landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum velur nevndina í fíggingargrunninum og tað er landsstýrið sum er størsti partaeigari í bankanum.

– Og eg skilji slett ikki, hvussu partaeigarin skal hava nakran sum helst áhuga í at vera tykta sítt egna barn.

Løgmaður sigur, at í hvussu so er dugir hann ikki at síggja ,at landsstýrið beinleiðis hevur miðvísar ætlanir um at um forða bankanum í at virka, ella nakað ávíst politiskt ynski um at seta fót fyri bankan. Vit hava heldur ikki gjørt nakra sum helst lóggávu, sum forðar bankunum í ar virka, heldur tvørturímóti.

Løgmaður veit væl, at tað hava verið nøkur sakarmál ímillum bankan og Landsstýrið.

Men eru tað hesi stríðsmálini, sum síggjar aftur í frágreiðingini, hóvar tað honum lítið.

– Tað plagar at vera so, at tøgn valdar ímeðan rætturin talar og summi av hesum sakarmálum eru ikki liðug enn.

Harafturat liggur málið um persónsupplýsingar og samstarvið við PBS í løgtingfinginum.

– Málið hevur verið fyri í Løgtinginum einaferð og Landsstýrið kann ikki gera øðrvísi enn Løgtingið vil.

– Men nú er tað so komið hartil, at Løgtingið fær høvi at taka avgerð í málinum einaferð afturat og tað avgerðina mugu vit rætta okkum eftir, sigur Anfinn Kallsberg.
Les eisini síðu 11.

# Televarpið víðkar sendinet og úrval

**Samstundis sum Televarpið víðkar um úrvalið við rásum hjá Viasat, kunnu klaksvíkingar og eysturoyingar eisini tekna seg sum kundar**

SJÓNVARP
*Jákup Mørk*

Tað hevur í eina tíð verið møguligt hjá Televarpskundum at síggja TV3, har eitt nú Robinson sendingarnar eru. Sum ein roynd varð í fyrsta umfarið avtalað, at hyggjararnir fingu hesa rás ókeypis fram til 1. apríl, og nú hevur Televarpið gjørt av, hvat hendir eftir hesa dagfesting.

Talan verður um eina nýggja samanseting av pakkum, har hyggjararnir kunnu velja ímillum fýra ymsar pakkar, umframt at møguleiki so eisini er at keypa sær atgongd til Canal+ rásirnar. Alt eftir, hvussu samansetingin í pakkunum er, verður kostnaðurin úr 129 upp í 488 kr. um mánaðin. Umframt TV3, fer úrvalið frá Viasat eisini at fevna um 3+, Viasat Sport, Viasat Action, Viasat Nature og Viasat Explorer.

Samstundis, sum nýggju pakkarnir verða marknaðarførdir, verður sendinetið hjá Televarpinum víðkað.

Higartil hava tað bert verið gomlu hyggjararnir hjá Rás Tórshavn, sum hava havt møguleika at taka myndirnar hjá Televarpinum, men eisini hetta verður nú broytt. Týsdagin komandi verður sendarin á Brúnaskarði tendraður, soleiðis at sendinetið røkkur til klaksvíkingar, og dagin eftir er tað so ein stórur partur av Eysturoynni sum eigur tørn, tá sendarin á Støðlafjallið verður tendraður.




Vit rudda í Elding!
Útstillingsvørur, litið brúktar vørur og hvítvørur við lítlum skaða, verða seldar fyri spottprísir. Eymhettir, komfýrar, køliskáp, vaskimaskinur, turkitrumlur og mangt annað, sera bíliga til sølu. Alt skal út, tí vit gera pláss fyri nýggjari vøru..!



SJOKKtilboð
Vit rudda okkara goymslu og selja tí eina ørgrynnu av hvítvørum fyri spottprísir, t.d.






Electrolux KØLISKÁP SUPER LÁGORKA
ER6645 • 159 ltr., orkuflokkur A, 85x55x60cm, Vanl. prísur 3990,00
2799,-
SPAR 1191,-

AEG INTIGRERAÐ KØLISKÁP
227 ltr., avrimning, Vanl. prísur 9335,00
4990,-
SPAR 4345,-

AEG INNBYGNINGS OVNUR
B8140-1a • ALU TEC, Pyrolyse, elektroniskt ur við automatik, støddi: 59x56x55cm, Vanl. prísur 16500,00
8990,-
SPAR 7510,-

AEG EYMHETTA
790 DA • Sera sterkur motorur, Føroya "stillasta", Vanl. prísur 4950,00
2990,-
SPAR 1960,-

UPPVASKIMASKINUR
Prísir úr einans
1990,-
SJOKK PRÍSUR

KERAMIKK-KOMFÝRUR
Prísir úr einans
2990,-
SJOKK PRÍSUR

KØLISKÁP SUPER LÁGORKA
Prísir úr einans
2799,-
SJOKK PRÍSUR

INNBYGNINGS OVNAR
Prísir úr einans
1990,-
SJOKK PRÍSUR

ELDING Í SMS • TEL 319697
Tilboðini er bert galdandi í Elding í SMS!
Allir prísir eru avheintingarprísir. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og útseldum vørum.
ELDING - EIN BETRI LOYSNI



Kaj Andreasen & Co
Heilsølu • smásølu • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo
Trygdarskógvar



Snøggir trygdarskógvar av týskari góðsku. Uttan iva teir bestu í landinum
8 ymisk sløg á goymslu
Vit hava trygdarútgerð til øll endamál
Skeltir til allar uppgávur!
Handskar til øll endamál
Sosialurin 311820



VHF telefon
til skip og bátar



DSC-D fyrireikað
kr. 3.575,-
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045



Frá Happadráttinum
Seinasti søludagur til 2. drátt er hósdagin 3. apríl



Størstu vinningar hesaferð:
1 x 60.000 kr.
1 x 30.000 kr.
1 x 25.000 kr.
1 x 15.000 kr.
5 x 10.000 kr.
10 x 5.000 kr.
70% av søluvirðinum verður latið til vinningar
HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN
Sosialurin 31 18 20



Eigarafelagið Eystan Gil
Ársaðalfundur verður í Hoyvíkar skúla hósdagin 10. apríl 2003 kl. 19.00.
Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin



Jón F. Johansen
Alt El-Arbeiði
Verður gjørt skjótt og væl
Tlf. 284210 & 311851
e-mail: una@post.olivant.fo



www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo